# HEILSANIR



**Góði babba**
Hjartaliga tillukku við 25 ára degnum. Her eru vit bæði móð. Eg elski teg.
**Heilsan Eyðvør**



**Góði beiggi og gubbi**
Hjartaliga tillukku við 25 ára degnum 17. okt. Vit ynskja tykkum báðum ein góðan túr til New Zealand.
**Heilsan Fróði, Rúna og Mattias**



**Góða fitta Lona**
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum, sum var 15. oktober. Muss og klemm frá
**Christian, mammu og babba**



**Góði Torbjørn**
Hjartaliga tillukku við 25 ára føðingardegnum. Onkuntíð má ein slitmaður hvíla seg.
**Heilsan eg**



**Góði Jóhannes gubbin**
Hjartaliga tillukku við degnum tann 16. Leingjast eftir tær. Kemur tú ikki ein túr til DK at vitja okkum?
**Kærar heilsur Bjarta, Sólbjørg og Petur**



Eg vil á henda hátt senda eina hjartans tøkk til børn míni, svigarbørn, abba- og langabbabørn, og øll sum vitjaðu meg, ringdu til mín, sendi blómur, fjarrit og heilsanir á 90 ára degi mínum. tit gjørdu mær dagin ógloymandi. Gud vælsigni tykkum øll.
**Heilsan**
**Olaf Vestergaard, Sumba**



**Góði elskaði Eyðfinn**
Hjartaliga tillukku við 25 ára degnum 17. Vónandi fer tú at dáma væl í New Zealandi
**Heilsan Fríða**


Sosialurin
Heilsanir
kr. 30,-

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐Týsd. ☐Mikud. ☐Hósd. ☐Fríggjad. ☐Leygard.

Tekstur:

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navnið og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn:
Bústaður:
Bygd/býur: Tlf.:

Sendið lepan, vmynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<


# Átta sleppa at byggja

**Gøta:** Fleiri gøtufólk hava helst bíðað við spenningi eftir avgerðini á seinasta fundinum í bygdaráðnum. Eitt av málunum var nevniliga tilsøgn um grundøkir í Norðragøtu.

Men her var eingin ivi: Bygdaráðið samtykti at geva átta umsøkjarum loyvi um grundøki í nýggju útstykkingini við Geytagøtu.

Hesi grundøkini verða játtað samsvarandi teimum vanligu treytunum.

**sb.**



*Nýtt kirkjuráð skal mannast 8. november. Millum tey sum sleppa á val er kirkjufólkið í Leirvík*

*Mynd: Leirvíkar kommuna)*

# Fyrsti kirkjuráðs-listin klárur

**Leirvík:** Týsdagin 8. november sleppur kirkjufólkið í Leirvíkar kirkjusókn at velja millum tveir listar við fólki at manna eitt komandi kirkjuráð.

Á báðum listunum eru seks valevni úr bygdini, og báðir listarnir hava eisini seks stillarar.

Valið fer fram í kirkjuni millum kl. 10 og 12, og aftur millum kl. 16 og 20 henda týsdagin í november mánaði.

Sum skilst sleppa fólk í Suðurstreymoyar eystaru kirkjusókn, á Glyvrum og í Klaksvík eisini á kirkjuráðsval.

**sb.**

# Frits framsýnir oljumálningar

**Tvøroyri:** Eftir at hátíðarhaldið við nýggja Smyrli er at enda komið, fáa suðuroyingar enn eitt høvi til eitt serstakt tiltak.

Seinnapartin sunnudagin lat nevniliga listamaðurin, Frits Johannesen úr Fuglafirði upp eina listaframsýning við oljumálningum í Gallarí Oyggin á Tvøroyri.

Framsýningar er opin til sunnudagin 30. oktober. Opið er allar dagar frá kl. 14 til 18.

**sb.**